# Løgmaður er dumpaður

**EDMUND JOENSEN**
løgtings- og fólkatingsmaður



**Trúvirðið hjá bankunum er framvegis í vanda, nú føroyski stjórnarleiðarin pínliga avdúkar seg sjálvan í almennum lesarabrævi í gjár**

Í 10 dagar hava ymsir partar í Føroyum nú skift orð um vandamestu ætlanina hjá CHE-samgonguni: stovnanina av einum føroyskum fíggjareftirliti.

Samgonguleiðarin, Jóannes Eidesgaard, hevur higartil hildið seg kúrran. Líka til í gjár. Tá sendi hann út eitt alment lesarabrævi við sínari hugsan um málið.

Í lesarabrævinum avdúkar føroyski stjórnarleiðarin seg pínliga í nøkrum sera grundleggjandi viðurskiftum innan fíggjarøkið.

Mín niðurstøða er, at hvørki samgongan ella samgonguleiðarin hava gjørt sítt heimaarbeiði, áðrenn avgerð er tikin um, at føroyskt fíggjareftirlit skal stovnsetast.

Harvið er størsta og mest týðandi aktivið hjá føroyskum bankum - trúvirðið – framvegis í vanda.

**Føroyar hava longu frían flutning av kapitali**

Í lesarabrævi sínum skrivar løgmaður m.a.: "Yvirtøkan vil geva okkum atgongd til tað eina av teimum fýra nógv umrøddu frælsunum, nevniliga frían flutning av kapitali".

Álvaratos. Hvar í Guðs garði hevur løgmaður verið seinastu árini, meðan føroyska bankavinnan hevur vunnið seg fram uttanlands? Heldur hann veruliga, at føroyskir bankar kunnu gera nakað sum helst á altjóða marknaðum, uttan at flutningurin av kapitali er fríur?

Í veruliga lívinum, sum henda samgongan eftir øllum at døma ikki livir í, er longu fríur flutningur av kapitali. Skulu vit spyrja hví? Jú, tí at vit longu eru partur av vælvirkandi danska fíggjargeiranum og eitt nú undir eftirlitið av tí roynda og trúverduga danska fíggjareftirlitinum.

**Er talan um eitt krav ella ikki?**

Aðrastaðni í lesarabrævinum skrivar løgmaður, at yvirtøkan av fíggjareftirlitinum "vil stilla okkum betur í okkara samráðingum um ein EFTA-limaskap".

Her ruggar ikki rætt, tí higartil hevur landsstýrið upplýst, at yvirtøkan av fíggjareftirlitinum er eitt krav, um Føroyar skulu kunna gerast EFTA-limur.

Hvat er nú rætt? Er talan um eitt krav? Ella brúkar landsstýrið EFTA-samráðingarnar sum undanførslu fyri at vilja yvirtaka fíggjareftirlitið?

Her hongur ikki saman, og vit mugu síggja dokumentatión fyri pástandinum um, at EFTA krevur eitt føroyskt fíggjareftirlit.

**Fíggjareftirlitið skal útveitast – ella?**

Trumf setur løgmaður á, tá hann avdúkar hægru meiningina við at hava eitt føroyskt fíggjareftirlit. Orð hansara eru her:

"Sannlíkt er, at endin verður, at vit gera eina avtalu við danska fíggjareftirlitið um, at tey røkja hesa uppgávu framyvir okkara vegna".

Altso skulu vit yvirtaka nakað, sum í dag virkar á fullgóðan hátt, fyri síðani at lata tað aftur til sama myndugleika at umsita. Hvar er logikkurin? Hvar er fyrimunurin fyri fíggjarvinnuna?

**Trúvirðið ávirkast kortini**

Veruleikin aftan fyri ætlanina um at yvirtaka og síðani útveita fíggjareftirlitið er, at endaliga ábyrgdin av fíggjarmálum og av fíggjareftirliti verður flutt úr Danmark til Føroya.

Trupulleikin liggur júst í hesum.

Fakta er, at á altjóða fíggjarmarknaðunum hava Føroyar tíverri ikki somu styrki og sama álit sum Danmark. Ongin hevur skyldina av hesum. Soleiðis er tað bara reint faktuelt.

Hetta merkir, at Føroyar hava ikki sama trúvirði á marknaðinum, tá tað kemur til at hava ábyrgdina av eftirliti við bankum og at tryggja innistandandi í føroyskum bankum.

Kortini vil løgmaður trýsta hesa ætlan niður yvir høvdið á bankavinnuni og á okkum, sum eru kundar í bankunum.

**Innskjótaratrygd í vanda**

Innistandandi hjá tær og mær í føroyskum bankum er tryggja í danska "Indsky dergarantifonden".

Løgmaður skrivar í lesarabrævi sínum, at føroysku bankarnir framhaldandi kunnu vera við í danska "Indskydergarantif onden", eftir at fíggjarøkið og -eftirltið er yvirtikið.

Hvaðani hevur løgmaður hetta?

Orsøkin til, at bankar góðtaka skipanina - og harvið at rinda fyri hvønn annan í "Indskydergarantifonden" - er, at teir hava eitt felags fíggjareftirlit sum tryggjar, at bankar ikki sleppa at hóðreiggja sær, sum teimum lystir, og harvið seta pening hjá hinum bankunum uppá spæl.

Um føroyskir myndugleikar skulu áseta, hvussu føroysku bankarnir skulu eftirhyggjast, so er spurningurin, um danskir bankar og myndugleikar vilja vera "í sama potti" sum vit.

**Ætlanin má sleppast**

Ætlanin hjá landsstýrinum hongur als ikki saman. Heldur ikki eftir at løgmaður hevur skrivað lesarabræv um ætlaðu yvirtøkuna.

Tí eru míni ráð framvegis: heldur enn at leggja forðingar í vegin, gnaga burtur av kappingarførinum og pilka við trúvirðið hjá bankavinnuni eigur Landsstýrið at geva vinnuni tær allar bestu umstøðurnar at virka undir.

Bankavinnan skapar nógv arbeiðspláss, vinnur nógvan pening uttanlands og fortelur samstundis umheiminum, at Føroyar er eitt framkomið samfelag, sum stendur seg í altjóðagjørda heiminum.

Vit eru helst fleiri, sum halda, at landsstýrið skal sleppa at taka ætlanina um at yvirtaka fíggjareftirlitið av skránni, uttan at nakar fer at lasta landsstýrið fyri tað.

# Hvar bleiv tvørpolitiska samstarvið hjá samgonguni av?

**ANNIKA OLSEN**
Løgtingskvinna fyri Fólkaflokkin



Her eru nakrar hugleiðingar eftir at hava sitið á Føroya Løgtingi í slakar tveir mánaðir. Hugagóð fór eg saman við andstøðuni til verka í tinginum og legði nógv góð lógaruppskot fyri tingið. Serliga hugaligt var tað at vita, at samgongan hevði lagt stóran dent á tvørpolitisk samstarv, og at andstøðan í stóran mun skuldi takast við uppá ráð. Tíverri mátti eg skjótt ásanna, at samgongan als onga vælvild hevði yvir fyri teimum lógaruppskotum, sum andstøðan legði fram, sjálvt um nógv av hesum uppskotum vóru tey somu, sum Javnaðarflokkurin átti lut í frá undanfarnu samgongu. Undir viðgerðini av lógaruppskotunum frá andstøðuni førir samgongan fram, at arbeitt verður við málinum, og at samgongan ynskir at leggja málini fram sjálv. Nú samgongan er komin við sínum málum sæst, at nógv av hesum málum meiri og minni eru identisk við tey mál, sum andstøðan hevur lagt fram, nevnast kann m.a. sambýlið fyri sinnisveik í Tórshavn, sambýlið fyri sinnisveik í Vági og lógin um Fróðskaparsetur Føroya. Onkrar smávegis og minni týðandi justeringar eru gjørdar, men tað hevði eisini borið til at gjørt hesar justeringar í nevndunum. Hevði tað ikki verið betur fyri borgaran og Føroya land um andstøða og samgonga løgdu málinum fram saman, so tað slapst undan at sita og viðgera somu mál 2 til 3 ferðir. Eg vil tó leggja aftrat, at glottar eru at síggja í einum møguligum samstarvi, av tí at nývald tingfólk í samgonguni hava átalað hvussu viðgerðirnar verða framdar í verki. Vónandi kunnu vit saman innføra skjótari og smidligari politiskar mannagongdir enn tær verandi, ið eru tungar og drúgvar, har tann einasti taparin er Føroya fólk.

**Landsstýrisfólk møta ikki á tingfundi**

Tað er átaluvert, at tað alt ov ofta kemur fyri, at landsstýrisfólk ikki møta upp til tingfund, tá ið mál, ið hava við teirra málsøki at gera eru til viðgerðar. Tað sýnist, at virðingin fyri andstøðuuppskotunum er lítil, tá landsstýrisfólk ikki møta upp til fundar. Landsstýrisfólkini skulu vera til taks hjá Løgtinginum, er tað neyðugt við spurningum og øðrum uppklárandi viðurskiftum, ið hava við lógaruppskotini at gera. At ikki at vera til staðar til viðgerðirnar er at vanvirða andstøðuna og Føroya Løgting yvirhøvur.

# EFTA málið stór skomm!

**SÓLVIT NOLSØ**
Politik lesandi í Newcastle upon Tyne í UK

CHE samgongan gjørdi sín fyrsta stóra brølara á uttanríkispolitiska økinum, tá Per Stig Møller einsamallur umboðaði Føroyar í Liktenstein og Sveis!

Stórt arbeiði er ígjøgnum nógv ár lagt í at fáa føroyska umboðan í EFTA. Hetta hevur bara ongantíð borið til, millum annað tí, at vilji hjá restini av limalondunum, serliga Sveis, ikki hevur verið til staðar. Nú er tó vent í holuni, tí nú eru sveisar klárir at samráðast. Tíverri er hetta ikki føroyingum at takka, men Per Stig Møller! At eingin úr føroysku samgonguni møtti upp, er stór skomm og svar løgmans, “tað lá ikki fyri”, er heldur ikki nakað at reypa av. Onkur mátti og skuldi verið sendur til fundirnar sum umboðan fyri okkara egna land! Nakað annað er tað, at bara hetta eina málið undirgrevur ein stóran part av samgonguskjalinum hjá CHE. Í partinum um uttanríkismál í samgonguskjalinum stendur:

“Virkað verður fyri føroyskum EFTA-limaskapi...”.

Eftir mínari metan er henda útsøgn longu tillátursgjørd! Víðari stendur at samgongan vil virka fyri: “...fullum luti í teimum fýra frælsunum í ES...”. Eisini vil samgongan: ...játta tann pening, ið krevst, til tess, at Føroyar kunna verða virkin partur í granskingarhøpinum hjá ES”.

Alt hetta kundi Føroyar fingið, um vit fingu EFTA limaskap. Ørsøkin til tað liggur í EEA avtaluni (Agreement on the European Economic Area). Henda avtala ger tað møguligt hjá londunum í EFTA, Sveis undantikið, at verða partur av sama marknaði sum øll ES londini. Vanliga kallað “Internal Market”. Henda avtalan umfatar millum annað tey fýra frælsini og samstarv á granskingarøkinum. Henda avtala umfatar IKKI fiskivinnupolitikk, sum hevur verið kanska størsta ósemjan í føroyska ES málinum. So brølarin sum samgongan gjørdi var kanska enn størri enn væntað av fyrstan tíð.

Eg skilji ikki, hví mann letur ein so stóran møguleika gleppa úr hondunum! Spurningurin er so, um samgonguskjalið bara var eitt pappír, sum skuldi útfyllast, tí onkur av flokkunum var so grammar eftir at sleppa í samgongu, at teir settu bara undirskrift á uttan at kanna, hvat stóð á pappírinum, tí samgongan tykist ikki serliga sinnað at útfylla tað, sum teir hava lovað.

Eg skal so ikki siga nakað um, hvat er og ikki, men eg haldi tað eisini verða undrunarvert, at ein samgonga, sum sigur seg verða sjálvsstýrissinnað, letur danan Per Stig Møller einsamallan umboða Føroyar á einum toppfundi í EFTA. Var okkurt um tjóðarbranding ikki eisini nevnt í samgonguskjalinum? Henda dagin dumpaðu Føroyar so dyggiliga í tjóðarbranding. Kanska skuldi danin fingið tann leiklutin eisini?

Lesið Sosialin - so eru tit við